Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 26.03.2025 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Magnus Skoralíð<br>Hanna Jensen<br>Ann Fuglø<br>Heri Mikálsson<br>Pól í Skorini<br>Rebekka Jensen<br>Unn Jarnskor Ellingsgaard<br>Uni Rasmussen |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |
| | Pól í Skorini var bert við í viðgerðini av máli nr. 25/00164 |

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 17/25 | 25/00121-2 | Umsókn um marknaumskipan - matr. nr. 18 og 66 í Syðrugøtu | 3 |
| 18/25 | 25/00127-2 | Umsókn um brúksrætt - matr. nr. 389a í Leirvík | 4 |
| 19/25 | 25/00129-3 | Til ummælis - Umsókn um at keypa undirlendi til úthús á matr. nr. 15 í Gøtugjógv - Búnaðarstovan | 5 |
| 20/25 | 25/00134-2 | Til ummælis - Umsókn um marknaumskipan - matr. nr. 389f og 389g LV | 6 |
| 21/25 | 25/00143-2 | Umsókn til ummælis - Sundurbýti matr. nr. 30a Gøtugjógv - Umhvørvisstovan | 7 |
| 22/25 | 25/00144-1 | Broyta býarplan og byggisamtykt – matr. nr. 138a, 343 og 130b í Syðrugøtu | 8 |
| 23/25 | 25/00156-1 | Søla av matr. nr. 339ap i Leirvík | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 24/25 | 25/00157-1 | Søla av matr. nr. 12 í Syðrugøtu | 12 |
| 25/25 | 25/00164-1 | Skúlin í Leirvík – matr. nr. 422a – Innkomin tilboð | 13 |
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 17/25 Umsókn um marknaðarumskipan - matr. nr. 18 og 66 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.03.2025 | 11/25 | 25/00121-2 |
| 2 Býráðið | 26.03.2025 | 17/25 | 25/00121-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um marknaðarumskipan millum matr. nr. 18, 66 og 37 í Syðrugøtu.<br><br>Í 2023 varð verandi staðseting av matriklinum 141, 265, 66 og 18 gjørd í samráð við eigarar, og endaliga samtykt í býráðnum í juni 2023. Síðan er ynski komi frá eigarum av matrikul nr. 18 og 66 um at flyta hesar matriklarnar 50 cm longur oman móti fjøruni, soleiðis at matrikul nr. 66 verður leysur av matrikul nr. 165.<br><br>Kortskjøl:<br>• Mál 23_00280 Neystamatriklar í Syðrugøtu<br>• Kortskjal neystamatriklar 66 og 18 í Syðrugøtu 11.03.2025<br><br>Lagdar verða 2,7 fermetrar aftrat matrikul 37 omanfyri matrikul nr. 18 og 66, og somu fermetrar lagdar aftrat matrikul 18 og 66 niðanfyri. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at flyta omanfyri nevndu matriklar 50 cm oman móti fjøruni. |

### Byggi - og býarskipanarnevnd 19. marts 2025

Byggi- og byarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingin.

### Býráðið 26. mars 2025

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 18/25 Umsókn um brúksrætt - matr. nr. 389a LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.03.2025 | 12/25 | 25/00127-2 |
| 2 Býráðið | 26.03.2025 | 18/25 | 25/00127-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um brúksrætt til part av matr. nr. 389a í Leirvík.<br><br>Eigarin av matr. nr. 389f søkir um umleið 555 fermetrar av matr. nr. 389a til at dyrka grønmeti og at hoyggja.<br><br>Sí viðfesta kortskjal 1. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir frá, at geva brúksrætt til part av matr. nr. 389a í Leirvík, sum víst á kortskjal 1. |

### Byggi - og býarskipanarnevnd 19. marts 2025

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at geva eigaranum av matr. nr. 389f brúksrætt til umleið 25x8 metrar av matr. nr. 389a omanfyri matr. nr. 389f.

### Býráðið 26. mars 2025

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 19/25 Til ummælis - Umsókn um at keypa undirlendi til úthús á matr. nr. 15 í Gøtugjógv - Búnaðarstovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.03.2025 | 13/25 | 25/00129-3 |
| 2 Býráðið | 26.03.2025 | 19/25 | 25/00129-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 3. mars 2025 frá Búnaðarstovuni, har heitt verður á kommununa, at ummæla eitt keyp av parti av matr. nr. 15 við Gøtugjógv.<br><br>Ætlanin er, at keypa umleið 300 fermetrar av festinum til rossahald, kloakk og vatn.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at samtykkja ummæli til Búnaðarstovuna. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. marts 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 26. mars 2025**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 20/25 Til ummælis - Umsókn um marknaumskipan - matr. nr. 389f og 389g LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.03.2025 | 14/25 | 25/00134-2 |
| 2 Býráðið | 26.03.2025 | 20/25 | 25/00134-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 4. mars 2025 frá Umhvørvisstovuni, har heitt verður á kommununa, at ummæla eitt keyp av uppískoytisstykki svarandi til 34,5 fermetrar av matr. nr. 389g at leggja aftrat matr. nr. 389f í Leirvík.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at samtykkja ummæli frá Umhvørvisstovuni. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. marts 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 26. mars 2025**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

Hanna Jensen var úti undir viðgerðini vegna ógegni

## 21/25 Umsókn til ummælis - Sundurbýti matr. nr. 30a Gøtugjógv - Umhvørvisstovan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.03.2025 | 15/25 | 25/00143-2 |
| 2 Býráðið | 26.03.2025 | 21/25 | 25/00143-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 10. mars 2025 frá Umhvørvisstovuni, har heitt verður á kommununa, at ummæla sundurbýti av matr. nr. 30a við Gøtugjógv, og at leggja part aftrat matr. nr. 2 við Gøtugjógv.<br><br>Ætlanin er, at sundurbýta matr. nr. 30a sambært viðfesta kortskjal "03 Tekning1" og at leggja part av matr. nr. 30a markeraðir við reyðum prikki á kortskjal "03 Tekning1" aftrat matr. nr. 2 við Gøtugjógv.<br><br>Sí annars viðfestu skjøl. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við ummælinum frá Umhvørvisstovuni. |

### Byggi - og býarskipanarnevnd 19. marts 2025

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

### Býráðið 26. mars 2025

Málið tikið av skrá

## 22/25 Broyta býarplan og byggisamtykt – matr. nr. 138a, 343 og 130b í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.03.2025 | 16/25 | 25/00144-1 |
| 2 Býráðið | 26.03.2025 | 22/25 | 25/00144-1 |

| Málslýsing: |
|---|
| Eysturkommuna hevur ætlanir, um at broyta býarplan og byggisamtyktini fyri matr. nr. 138a, 130b og tann partin av matr. nr. 343 ið ikki liggur sum eitt B, Bústaðarendamál til B. Bústaðarendamál.<br><br>Upprunin til málið er, at tað er bygd á matr. nr. 130b og 343, og verða hesir matriklar ikki brúktir til Landbúnaðarøkir longur, harumframt hevur ætlanin verið at matr. nr. 138a skal brúkast til bústaðaøki. Hetta er ikki blivið fram í mun til ætlanina fyri økið.<br><br>Broytingarnar fevna um:<br>Matr. nr. 130b liggur í einum J, Landbúnaðarøki, og skal broytast til B, Bústaðarøki.<br><br>Matr. nr. 343 liggur partvís um J, Landbúnaðarøki og B, Bústaðarøki, hesin matrkulin skal liggjast sum B, Bústaðarøki.<br><br>Matr. nr. 138a liggur í einum J, Landbúnaðarøki og skal broytast til eitt B. Bústaðarøki, í samband við broytingina verður í framtíðini neyðugt, at leggja nakrar fermetrar aftrat matr. nr. 138a fyri at fáa vegatkomu. Hesir fermetrarnir mugu fáast av matr. nr. 231. Hetta skal gerast í samráð við eigaran av matrikul nr. 231. |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| |

| Tilmæli |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingunum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. marts 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 26. mars 2025**

Per Martin Gregersen setti fram broytingaruppskot:

*At fari verður undir eitt størri arbeiði við býarplan og byggisamtykt í økinum og kommununi í einari heild, heldur enn at samtykkja verðandi tilmæli.*

Atkvøtt var um broytingaruppskoti og var tað einmælt samtykt.

## 23/25 Søla av matr. nr. 339ap i Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.03.2025 | 17/25 | 25/00156-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.03.2025 | 12/25 | 25/00156-1 |
| 3 Býráðið | 26.03.2025 | 23/25 | 25/00156-1 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur fingið fyrispurning um keyp av matr. nr. 339ap og part av matr. nr. 339a í Leirvík.

Ætlanin er at byggja umleið 20 íbúðir á matr. nr. 339ap og 339a í Leirvík. Har av skulu 8 íbúðir á umleið 74 fermetrar við tilhoyrandi parkeringsplássum byggjast á matr. nr. 339ap.

Tað liggur í ætlanini hjá Eysturkommunu, at tað skulu byggjast íbúðir á matr. nr. 339ap í Leirvík.

Matrikul 339ap varð útboð til íbúðarbygging í 2022, og grundøki selt til íbúðarbygging, byggingin kom tó ikki í gongd, og Eysturkommuna hevur fingið grundøki aftur.

Tilber ikki í verandi støðu at selja matr. nr. 339a, tá hesin matrikulin ikki er sundur matrikuleraður.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at selja matr. nr. 339ap til íbúðarbygging.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. marts 2025**

Byggi- býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 24. mars 2025**

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 26. mars 2025**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinumhjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini

## 24/25 Søla av matr. nr. 12 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.03.2025 | 18/25 | 25/00157-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.03.2025 | 13/25 | 25/00157-1 |
| 3 Býráðið | 26.03.2025 | 24/25 | 25/00157-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommunu hevur fingið fleiri fyrispurningar av keyp av matr. nr. 12 i Syðrugøtu.<br><br>Tað liggur í ætlanin hjá Eysturkommunu at økið skal brúkast til miðstaðarendamál, og byggisamtyktin loyvir eisini hesum.<br><br>Við sølu av hesum matriklinum hevur Eysturkommuna ætlanir um at gera eina sølulýsing, har lýst verður hvat kann byggjast á økinum og krøvini hetta. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at gera eina lýsing av økinum og at bjóða matr. nr. 12 í Syðrugøtu til sølu. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. marts 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at gera eina sølulýsing fyri part av matr. nr. 12 í Syðrugøtu.

**Fíggjarnevnd 24. mars 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 26. mars 2025**

Málið tikið av skrá

## 25/25 Skúlin í Leirvík – matr. nr. 422a – Innkomin tilboð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 24.03.2025 | 14/25 | 25/00164-1 |
| 2 Býráðið | 26.03.2025 | 25/25 | 25/00164-1 |

**Málslýsing:**

Tað varð samtykt í býráðnum 3. oktober 2024, at bjóða útbyggingina av skúlanum í Leirvík út sum høvuðsarbeiðstøka við innbodnari licitatión.

5 arbeiðstakarar vóru bodnir við at bjóða uppá verkætlanina, og 4 tilboð komu inn.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| HVT | 72.162.253,00 kr. |
| Búsetur | 80.578.032,00 kr. |
| Articon | 78.337.736,00 kr. |
| Kanjon | 64.473.962,00 kr. |

Innkomnu tilboðini eru gjøgnumgingin fyri møguligar feilir og manglar. Høvuðsráðgevin hevur gjørt eitt tilmæli, har hann mælir til at fara undir sáttmálasamráðingar við Kanjon, ið hevur lægsta tilboðið.

Viðfest skjal: SÍL – Tilboð frá arbeiðstakarum og eftirkanning av lægsta boð.

Umsitingin hevur saman við ráðgevanum verið í samráðingum við Kanjon og teir standa við tilboðið.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at taka av tilboðnum hjá Kanjon, undirskriva sáttmála og seta arbeiði í gongd.

### Fíggjarnevnd 24. mars 2025

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Býráðið 26. mars 2025</u>**

Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini, sum er at taka av tilboðnum frá Kanjon, undirskriva sáttmála og seta arbeiðið í gongd

**Atkvøður fyri:**
Per Martin Gregersen, Magnus Skoralíð, Hanna Jensen, Poul í Skorini, Ann Fuglø, Uni Rasmussen, Heri Mikálsson, Unn Jarnskor Ellingsgaard

**Atkvøður ímóti:**
Rebekka Jensen, við tí viðmerking at hon heldur at tað er alneyðugt at arbeiða fram ímóti einum felags skúla í Eysturkommunu

fundurin lokin kl 19.00

________________________
Per Martin Gregersen

________________________
Magnus Skoralíð

________________________
Hanna Jensen

________________________
Ann Fuglø

________________________
Heri Mikálsson

________________________
Pól í Skorini

________________________
Rebekka Jensen

________________________
Unn Jarnskor Ellingsgaard

________________________
Uni Rasmussen